gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Nýggj bók um Smiril




**Danski rithøvundurin Bjarni Åkesson Filholm, sum ættaður er úr Føroyum, hevur givið út bók um Gamla Smiril**

BÓKAÚTGÁVA

Ein nýggj bók um Smiril er komin á marknaðin. Bókin er givin út í Danmark og verður at fáa í flestu føroysku bókasølunum umleið 22. juni, sigur forlagið Nautilus í tíðindaskrivi.

At bókin eitur Smiril, sum stavaður verður við fyrra i, sigur beinanveg frá, at talan er um Smirilin við teirri eyðkendu floytuni, Gamla Smiril, sum hann varð nevndur, tá nýggjur Smyril varð smíðaður á Tórshavnar Skipasmiðju í 1967.

Høvundurin skrivar í fororðinum, at hann væl veit, at Erling Poulsen longu hevur skrivað bók um Smyrlarnar, og at hendan bókin ikki skal síggjast sum nøkur kapping til ta bókina. Tvørtur í móti, sigur Bjarni Åkesson Filholm, hevur bókin hjá Erlingi verið inspirerandi, meðan arbeitt hevur verið við hesi bókini.

Bjarni Åkesson Filholm hevur fyrr givið út bók um Tjaldur, sum smíðað varð í Aalborg. Meðan arbeitt varð við teirri bókini, kom hann ofta fram á navnið Smiril, sum eisini var ein íblástur til at fara undir bók um hetta skipið.

Eitt annað, sum felags er fyri hesi bæði skipini, er at tey bæði eru smíðað í Norðurjyllandi – Tjaldur í Aalborg og Smyril í Frederikshavn – »af vendelboer«, sum hann tekur til og sipar við tí til, at hann sjálvur býr í Vendsyssel.

Men eisini onnur ting hava verið viðvirkandi til, at hendan bókin er skrivað. Eitt nú, at hann er í ætt við tann »legendariska« Jens á Hvítanesi, sum meira ella minni verður settur í samband við Smiril, tá hann verður nevndur. Í tí liggur so eisini, at høvundurin er ættaður úr Suðuroy, og sjálvandi sum partvíst suðringur hevur eina nostalgiska kenslu fyri Smirli.

Tað er ikki fyrstu ferð, Bjarni Åkesson Filholm gevur bók út um skip. Bókin um Tjaldur kom út í 1999, og í fjør gav hann út bók, ið hann nevndi »De hvide skibe«, og sum er um skip hjá borholmskum felag.

Bókin er 80 blaðsíður við tekningunum av Gamla Smyrli umframt nógvum fotomyndum, sum vísa allar fýra Smyrlarnar, sum siglt hava.

**ej**

# Eykasýningar við teitinum

**Eykasýningar av Norðoyastevnuteitinum verða í dag og um vikuskiftið**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*Lokalir persónar fáa okkurt skotið í Norðoyastevnuteitinum, sum hevur verið spælt fyri fullum sali seinastu tvær vikurnar.*
*Mynd: JH*

**Klaksvík:** Klaksvíkar Sjónleikarfelag fer nú at hava nakrar eykasýningar av Norðoyastevnuteitinum, sum hevur verið sera væl umtókt.

Síðani framførslurnar byrjaðu beint fyri norðoyastevnuna hevur verið spælt fyri fullum sali, og eisini seinastu sýningarnar farna vikuskiftið vóru fyri útseldum sali.

Tí fara tey í Sjónleikarfelagnum at hava eykasýningar av Norðoyastevnuteitinum, og tann fyrsta verður í kvøld klokkan 20.00. Síðani verður spælt aftur leygardagin, tá tvær sýningar verða.

Norðoyastevnuteitið er skemt av ymsum slagi. Lokalir persónar standa fyri skotum, og hendingar frá farna árið verða tulkaðar eitt sindur øðrvísi.

# Norskt manskór á Føroyavitjan

Mannssambandet, manskórið hjá Frelsunarherinum í Noreg, vitjar í Føroyum í døgunum 25.-29. juli 2001.

Hendan »dupult-kvartettin – við orkestri« – var stovnað í sambandi við Sjónvarps-innsamlingina í 1995, og hevur síðan nátt at gera vart við seg á mangar ymsar háttir. Í rekkjuni av artistum, sum hava samarbeitt við kórið, teljast m.a. Leningrad Cowboys, Wenche Myhre, Hanne Krogh, Stephen Ackles og Hans Inge Fagervik. Kórið hevur verið á konsertferð í Australia, Bali, Singapore, Íslandi, Ongland og so úr enda í annan í Noreg. Teir hava eisini luttikið í mongum tiltøkum, líka frá altjóða jazz-festivalinum í Molde til djóraframsýning í Seljord! Í februar mánaði var tað Svalbard, sum fekk høvi at hoyra teirr tónleikaframførslu. Fleiri sjónvarpsluttøkur hava eisini verið á skránni hesi árini.

Fyri einum ári síðan góvu teir út sína fjóru fløgu »..slítist ei av tíðartonn«, og blaðið »Vårt Land« skrivaði m.a. »…Tónleikaúrvalið er fjølbroytt, frá andaligum vísum og gospelsangi til sálmar. Ein partur er merktur av poppi, annað er meira traditionelt. Men teir 14 sangirnir eru ein samantvinnað heild og innspælingin er framúr góð. Serliga er tað sangurin, sum er einastandandi við sínum samansjóðaðu og kláru mansrøddunum. Hetta er ein pláta við bæði tónleikaligari og andaligari tyngd…«

Ein konsert ummælari í »Ringerike Blad« skrivað m.a. »…Við eini skrá, sum spennir yvir alt frá gospel við synkopum, reggaerytmum, Stevie Wonder íblástri á la »Isn't she lovely« til meira róligum balladum, hugtók Mannsambandet áhoyrararnar við eini sterkari hond, framúrskarandi framførslu, ótrúligum dynamikki og einum klárum boðskapi. Tað hoyrdist á áhoyrarunum at teir fegnir vildu hoyra meira. Hetta ynski var eisini okkarar og vit heita á fólk, um at fara at lurta eftir manskórinum, líkamikið hvørja fatan man annars skuldi havt av kristindómi og trúarrørslum. Eitt møti við Mannssambandet gloymir man ikki so lætt…«

Í Ólavsøkuvikuni syngja og spælir hesin bólkurin ymsa staðni í Føroyum. Ein av solistunum, Eyðfinn Joensen, er júst fluttur aftur til Tórshavn eftir at hava búð nógv ár í Noregi.

Kórleiðari er Thor Fjellvang frá Asker. Hann hevur m.a. arbeitt sum tónleikaleiðari fyri Árligu Sjónvarps-innsamlingina í Noregi, har Frelsunarherinum fekk inntøkuna í 1995. Hann hevur eisini verið kapell-meistari fyri árligu jólakonsertina í konserthúsinum í Olso, sum tey seinnu árini er send í føroyskum sjónvarpi.

Kunningarstjórin hjá Frelsunarherinum í Noreg, Major Njál Djurhuus, er ferðaleiðari á føroyatúrinum.

# Hittast aftur 25 ár seinni



Leygardagin 23. juni hittast tey aftur, sum tóku HF-prógv í Hoydølum í 1976. Hetta var søgulig próvtøka, við tað at hesi – saman við teimum í Klaksvík og í Suðuroy – vóru tey fyrstu yvirhøvur, ið tóku HF-prógv í Føroyum.

Ætlanin er at hittast í Hoydølum kl. 16.00 og kl. 19.00 er ætlanin at koma saman á Hotel Hafnia til ein góðan bita og at minnast á gamlar dagar.

Roynt hevur verið at fingið fatur í øllum næmingunum, men skuldi onkur verið, ið ikki hevur fingið boð, verður viðkomandi biðin um at gera var tvið seg (p-flokkurin Símun 317035/221100 – q-flokkurin Jónsvein 444738).

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Pensjónistar onga hjálp til reingerð

**- Øll reingerð uttan tann sum er neyðug av heilsuávum, verður spard burtur í summar, sigur Jákup Foldbo, leiðari í Heimarøktini**

HEIMARØKTIN
*Turið Kjølbro*



*- Eisini vit harmast um støðuna, men vit vita, at tey royna at klára seg, eitt nú við hjálp frá avvarðandi, sigur Jákup Foldbo, leiðari fyri Heimarøktina.*
*Savnsmynd*

Í summar fáa um 300-400 eldri fólk í Føroyum onga reingerð í heiminum. Vegna nógv økta arbeiðsbyrðu og orsakað av trongum fíggjarkørmum, verður sagt.

- Øll reingerð uttan tann sum er neyðug av heilsuávum, verður spard burtur í juli og í august. Orsøkin er, at fíggjarkarmurin er trongur umframt, at tað er trupult at fáa starvsfólk í summar. Henda sparingin er kanska ikki stór í pengum, men heldur í starvsfólki, sigur Jákup Foldbo, leiðari fyri Heimarøktina.

Nógv tann størsti parturin av heimarøktini, eini 80 prosent, er persónlig røkt og hon verður veitt sum altíð.

- Heimarøktin er síðstu árini vorðin væl tyngri. Tað eru fleiri tyngri eldri brúkarar inni í skipanini, stórur tørvur er á røktarheimsplássum og sambýli, og tá ið deildir verða stongdar á sjúkrahúsunum, merkja vit tað eisini í Heimarøktini, sigur Jákup Foldbo.

Øll økini hjá Heimarøktini verða rakt líka í summar. Undanfarnu ár hevur verið ymiskt, hvussu heimarøktin hevur roynt at siglt millum skerini summarhálvuna. Heitt verður á avvarðandi um at veita teim eldru í familjuni reingerð í summar.

- Vit eru greið yvir, at hetta kemur illa við hjá nógv teim flestu. Eisini vit harmast um støðuna, men vit vita, at í fleiri førum royna tey at klára seg, eitt nú við hjálp frá teim nærmastu. Í einstøkum førum meta vit um, um reingerð kortini skal veitast, har annað ikki ber til. Trupulleikin er eisini tann, at í flestu økjunum hava vit ikki nóg mikið av starvsfólki, sigur Jákup Foldbo.

Vantandi starvsfólk í Heimarøktini er smátt um smátt vorðin ein trupulleiki. Serliga í Havn er ringt at fáa fatur á fólki.

- Tá ið nógv arbeiði er at fáa, byrjar arbeiði sum heimahjálp at verða ringt at fáa fólk til. Í løtuni eru 20 starvsfólk til uppskúling í almanna- og heilsuskúlanum. Tískil hava vit 20 avloysarar fyri hesi, sigur Jákup Foldbo.

Um 380 fólk arbeiða sum heimahjálparar kring landið.

# Stuðulsfelag stovnað

**Leygardagin varð stuðulsfelag fyri foreldur at børnum við lesitrupulleikum stovnað**

FUNDUR
*Turið Kjølbro*

Gott og væl hálvt hundrað fólk vóru møtt til stovnandi fundin av stuðulsfelag fyri foreldur hjá børnum, sum hava lesitrupulleikar. Ikki bert foreldur, men eisini fólk, sum onkusvegna varða av hesum børnum. So sum lærarar, pedagogar, fólk av Sernámsdeplinum og onnur.

- Vit eru sera væl nøgd við undirtøkuna, sigur Anne-Karin Kjeld, stigtakari fyri fundin.

Orsøkin til, at eitt stuðulsfelag verður sett á stovn er, at foreldur at børnum, ið hava trupult við at læra at lesa, ikki fáa hjálp nakrastaðni til síni børn.

- Eingin veit, hvussu hesi børnini kunnu verða hjálpt. Skúlamyndugleikar og aðrir myndugleikar duga ikki at meta um trupulleikan, og foreldrini verða ikki tikin fyri fult, tá ið tey vísa á trupulleikan. Hesi børnini verða sópað undir teppið, eisini av lærarum, sum í ov langa tíð halda, at alt fer at laga seg. Skulu hesi børnini fáa munadygga hjálp, skal skjót og góð hjálp setast inn. Men vit síggja, at tímatalið verður skert, at eykatímarnir til børn við serligum tørvi gerast færri og tað ger støðuna bara nógv verri, sigur Anne-Karin Kjeld.

Endamálið við stuðulsfelagnum er fyrst og fremst at savna foreldur at børnum við lesitrupulleikum. Eftir summarfrítíðina fer ein nevnd til verka, og ætlanin er, at arbeiða fram ímóti at ávirka myndugleikarnar soleiðis, at eitthvørt verður gjørt fyri børn, ið hava lesitrupulleikar.

# Menna arbeiðið í fólkaskúlanum

**Í heyst ber til á fyrsta sinni at søkja stuðul úr fólkaskúlagrunninum, hvørs endamál er at kveikja og menna arbeiðið í føroyska fólkaskúlanum**

GRUNNUR
*Turið Kjølbro*

Mentamálastýrið hevur samtykt viðtøkur um fólkaskúlan við heimild í grein 66a í løgtingslóg frá 20. juni 1997 við seinni broytingum um fólkaskúlan.

Endamálið við grunninum er at veita granskingarstyrk til verkætlanir í námsfrøði. Grunnurin, ið er sjálvsognarstovnur, skal serliga stuðla verkætlanum, sum kveikja og menna arbeiðið í føroyska fólkaskúlanum. Trý fólk stjórna grunninum. Tey eru formaðurin í Føroya Lærarafelag, sum er Elsa Birgitta Petersen, borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, sum er Jan Christiansen, og deildarstjórin í Fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum. Hesin verður stýrisformaður. Deildarstjórin í Fólkaskúladeildini, Hensar Ellingsgaard, fer nú frá fyri aldur. Søkt verður eftir nýggjum deildarstjóra í bløðunum.

Stovnsfæið í fólkaskúlagrunninum er umleið hálv onnur millión krónur. Hetta er tann ogn, sum á stovningardegnum er í føroyskum og donskum peningastovnum undir heitinum Færø Amts Skolefond og Færø nedlagte skoles legat. Grunnurin kann søkja sær fíggjarstyrk aðrastaðni.

Grunnurin kann veita stuðul, ið er 75 prosent av teirri virðisøking, sum stendst av rentuskriving, vinningsbýti og tílíkum í undanfarna tvey ára skeiði.

Avgjørt er, at lýst skal verða um stuðulsmøguleika úr omanfyri nevnda grunni á fyrsta sinni á heysti 2001.